3 frá 3'aranum

FLØGUUMMÆLI

FRÓ›I LØKSÁGAR›

Britney Spears

I Did It Again

Henda fløgan stinkar! — so er ta› sagt. Ta› er óskilligt at Britney Spears nakrantí› er blivin til naka› innan tónleikaheimin. Henda unga vakra dáman er líka so monoton at hoyra uppá sum eitt bornholmara ur. Henda n‡ggja fløgan hjá henni er framleidd av teimum somu sum vóru vi› á teirri fyrru útgávuni, so ljó›i› er rættuliga líkt. Partar av fløguni eru uppttiknir í Svoríki har nakrir av framlei›ararnum og sangskrivararnum hjá henni halda til.

Tónleikurin er plastikkpoppur av ringasta slag. Alt er gjøgnumhugsa› ni›ur til minstu detalju, og ta› eru nærum eingi mørk fyri hvussu vamlisligt ta› kann blíva. Bara heiti› á hesi fløguni sigur meiri enn nokk. Oops! I Did It Again, er eitt heiti sum aspirerar til at vera upptiki› í rekordbókina hjá Guiness fyri at vera ta› mest láturliga nakrantí›.

Gamla Rolling Stones lagi› (I Can't Get No) Satisfaction, er á hesi útgávuni lati› í n‡ggjan ham, av barmføgru sunnudagsskúlagentuni, sum ger alt hvat hon er ment, at koma burtur frá smágentu útsjóndini sum skuldi hjálpa til at selja fyrru útgávuna hjá henni.. Eina meiri láturliga og turrgelda útseting av hesum lagnum, hevur man ikki hoyrt fyrr, vi› undantaki av útgávuni hjá Samanthu Fox frá 1987. Øll saft og kraft er vekk, og lagi› sum skapti mikla øsing tá Rolling Stones komu fram vi› tí, er reducera› til tann reina elevatormusikk. Ta› er ótrúligt at eingin av øllum teimum fólkunum sum eru rundan um hana hevur vegleitt hana eitt sindur, solei›is at hon skilti at gamlir Stones sangir hava einki at gera inni á tannáringa kømrum nú vit skriva 2000. Og hon sjálv ikki vassa›i út har hon ikki grynti.

Einasta positiva í› kann dragast fram um hesa útgávuna, er tann vakri húsin. Ta› tekst ikki burtur at Britney Spears hevur útsjóndina vi› sær, og at hetta nokk eisini skal hjálpa henni at selja nakrar fløgur afturat. Men tó, 159 kr er ein heldur grovur prísur fyri eina kápu, líka miki› hvussu innbjó›andi hon sær út.



Pantera

Reinventing The Steel

Tungu dreingirnir í rokkinum, Pantera, eru nú aftur fløgu aktuellir. Reinventing The Steel er heiti› á teirra seinastu opus, sum vi› growli frá Phil Anselmo, trummuspæli frá Vinnie Paul og tungum guitarspæli frá Dimebag Darrel skal hjálpa til at seta fokus aftur á tann tyngra rokkin, sum meira ella minni hevur ligi› í dvæla í seinastuni.

Heiti› Reinventing The Steel, kann setast í samband vi› Judas Priest. Judas Priest var ein av bólkunum í new wave of british heavy metal sum kom fram í sjeytiárunum í Onglandi. Í 1980 góvu Judas Priest út teirra nógv róstu British Steel plátu, sum í dag er at rokna sum ein klassikari innan tann tyngra rokkin. Nú gott 20 ár seinni endurn‡tta Pantera partar av heitinum vi› teirri vón at teir kunnu vera vi› til at blása n‡tt lív í rokkin

Sjálvt um Pantera hava sett sær høgar vónir vi› hesi útgávuni, so ver›ur tú ikki tikin av fótum tá tú hoyrir hesa útgávuna, væl at merkja um tú hevur hoyrt Pantera fyrr. Vi› útgávum sum Cowboys From Hell, A Vulgar Display Of Power og Far Beyond Driven, hava teir sligi› sítt navn fast sum eitt av mest tí›andi nøvnunum innan tann tunga rokkin. Hesa stø›u halda teir fast um á n‡ggju útgávuni, samstundis sum at teir ikki leggja naka› n‡tt afturat, burtursæ› frá eitt sindur av analogum óljó›i í stø›um sum vit líka so væl kundu veri› fyri uttan.

Henda tiggjunda útgávan hjá bólkinum er so hegnisliga skrúva› saman at her er okkurt bæ›i til teir meira ortodoksu tungmálmsdyrkararnar sum krevja integritet, og eisini til teir meira lættbeintu vikuskiftis kornpikkararnar, sum kanska umbo›a tann større partin av keyparunum. Skulu hæddarpunkt nevnast, so eru ta› Hellbound og Goddamn Electric har einasti gesturin á fløguni — Kerry King úr máttmiklu Slayer — hevur lagt eina óvanliga spontana og kaotiska outro. Pantera hava upp gjøgnum nítiárini veri› rættiliga stø›ugir vi› útgávum ; tó er ta› so at hetta er fyrsta studio-útgávan hjá bólkinum í heili 4 ár. Tá í› hetta ver›ur tiki› vi›, so er tó ein munandi hækking farin fram á tónlistarliga økinum í mun til heldur óinspirera›a og gumputunga ´96 útspæli› The Great Southern Trendkill, sum møguliga vísti á at bólkurin var farin at mangla gó› hugskot, men vi› Reinventing The Steel eru buldribassarnir úr Texas aftur koyriklárir.

Eagle Eye Cherry

Living In The Present Future

Save Tonight og Falling In Love Again eru sangir sum renna lesaranum til hugs, tá tosi› fellur á navni› Eagle Eye Cherry. Hesin ungi ma›urin, í› er bústitandi í New York fyri ta› mesta, men sum tó hevur rætur til Svoríki, og eina ávísa sangarinnu nevnd Neneh Cherry, er nú aftur klárur vi› einari fløgu vi› n‡ggjum tilfari.

Aftana at hava hoyrt ta› fyrru fløguna hjá Eagle Eye Cherry, er ta› freistandi at útnevna hann at vera eitt sera gott bo› uppá eina døgnflugu. Nøvn sum eitt nú Nik Kershaw, og tann eitt sindur minni kendi Kenny Thomas renna einum til hugs. Hesir menn megna›u at fáa nøkur minni hit, á›renn teir enda›u langt burtur frá tónleikavinnuni, sum mjólkamenn ella sum vanligir arbei›smenn, vi› stempulkortum og thermokannum.

Ta› er eisini okkurt sum bendir á at Eagle Eye Cherry hevur hugsa› henda tankan, og mi›víst roynir at verja seg ímóti einari tilíkari lagnu. Eitt nú hevur hann fingi› kenda amerikanska framlei›aran Rick Rubin at hjálpa sær. Rick Rubin hevur fyrr arbeitt saman vi› nøvnum sum AC/DC og ikki minst Johnny Cash. Sjálvt um løgini hjá Eagle Eye Cherry eru poppalig og beint fram, so megnar Rick Rubin at fáa eina n‡ggja dimensión fram, har hann ger nakrar royndir, tó uttan at løgini gerast minni tiltalandi fyri poppoyra›.

Sum sagt so er Eagle Eye bró›ur Neneh Cherry. Systurin hevur eisini veitt honum eina hjálpandi hond á hesi útgávuni á lagnum Long Way Around. Onnur løg í› eru verd at nevna á hesi útgávuni eru Are You Still Having Fun?, Together We'll Die, og One Good Reason. Dámar tær lættan popptónleik, er henda fløgan eitt gott væl, sjálvt um hon í stø›um kann kennast naka› einstátta›. Ta› stutta av tí langa er at er ta› nakar í Cherry familjuni sum hevur evnir fyri popptónleiki, so er ta› hann.



Tað loysir seg ikki at skifta út

Líkt er til, at venjarar eiga at hugsas seg væl um, áðrenn nakrar útskiftingar verða framdar

Dysturin heima á Sandi var fyri B36 rættiliga sermerktur, og ikki bara tí, at havnarmenn spældu við einari á mangan hátt nýggjari manning. Venjarim hjá B36, Pelle Andersson, gjørdist tann fyrsti í hesum kappingarárinum, sum ikki hevði skift nakran spælara út. Royndir frá undanfarnu kappingarárunum vísa, at tað ofta ávirkar úrslit til fyrimuns fyri tað liðið, ið ikki brúkar útskiftingar.

Tíggju ferðir í trý ár er tað komið fyri, at eitt ella annað felag ikki gjørdi nakra útskifting, og bert einaferð tapti tað liðið. Tað var í dystinum í Gøtu millum GÍ og HB, tá ið vertirnir leiktu næstan allan tíðina við Henningi Jarnskor í málinum, eftir at Sunvard Joensen var útvístur. Tvær ferðir spældu liðini við somu manning allar 90 minuttir javnt, og sjey ferðir vunnu tey.

B36 venjarin, Pelle Andersson, var fyrsti venjarin, sum ikki gjørdi sær dælt av útskiftingum í ár

Eisini hjá landsliðinum

Vit kunnu leggja afturat, at báðar tær ferðirnar, tá Alandsliðið í fótbólti hevði somu ellivu leikarar á vøllinum allar 90 minuttir, vunnu føroyingar.

Talan er um tveir á hvør sín hátt minniligar dystir: 3-0 heimasigurin á San Marino í 1995 (tann størsti sigurin hjá føroyingum nakrantíð í altjóða skrásettum dysti), og - ikki at gloyma - 1-0 sigurin á Eysturríki í 1990.

So venjarar áttu kanska at hugsað seg tvær ferðir, áðrenn teir fremja útskiftingar. Hágtølini tala í hvussu er ímóti hesum.

IE

umfar	felag	mótstøða	úrslit
1998			
6	GÍ*	Sumba	1-1 (ú)
7	GÍ	ÍF	3-1 (h)
10	GÍ	NSÍ	5-1 (h)
17	GÍ	B36	5-2 (h)
1999			
4	B36	B68	2-1 (ú)
11	GÍ*	HB	1-2 (h)
12	GÍ	VB	3-1 (ú)
13	KÍ	GÍ	0-0 (h)
16	VB*	NSÍ	2-0 (h)
2000			
5	B36*	B71	2-1 (ú)

* høvdu ein spælara útvístan

Teprir sumbiarsigrar

Ikki er tað ofta, at sumbingar vinna sínar dystir, og aloftast er munurin sera tepur

Tað er sera langt ímillum sigrarnar hjá sumbingum, og tí er ein og hvør sigur hjá teimum at siga stórhending.

Síðan 1998, tá ið sumbingar fluttu upp í 1.deild, hava teir spælt 41 landskappingardystir (upp- og niðurflytingadystir ímóti LÍF úr 2.deild ikki íroknaðir). Og hetta er bert fimta ferðin, at felagið úr sunnastu bygdini í Føroyum hevur fingið øll trý stigini.

Tveir sigrar í 1998 og tveir í fjør vóru nóg mikið fyri at røkka nýggjunda og næstsíðsta plássinum, og harvið varðveitta sessin í bestu deildini ígjøgnum upp- og niðurflytingaruppgerðir ímóti leirvíkingum.

Tað er eingin trygd fyri, at tveir vunnir dystir verða nokk hjá sumbingum hesaferð. Eingin veit, hvussu nógv stig fáa hini liðini, ið fara at stríðast ímóti niðurflyting, men við sigrinum á FS Vágum byrjaðu sumbingar í hvussu er sína „mission impossible“ triðja árið á rað.

Í fjør komu fyrstu stigini til Sumbiar ikki fyrr enn í nýggjanda umfari, tá teir vunnu grannauppgerð ímóti VB

Fimm sigrar í 41 landskappingardystum. Um vit írokna árið 1991 uppí, tá ið Sumba royndi seg í bestu deildini fyri fyrstu ferð, so siga vit sjey sigrar í 59 dystum. Til stuttleikar kann hetta verða samanborið við avrikini hjá føroyska landsliðnum úti í heimi. Higartil hava Føroyar spælt 65 altjóða skrásettar landsdystir og vunnið átta ferðir.

Áhugavert er, at nærum allir sigrar hjá Sumba í 1.deild hava verið teprir - við einum máli. Bert einaferð hevur hað eydnast sumbingum at vunnið størri. Tað var í ógloymandi dystinum í Gundadali ímóti HB í 1991. Úrslitið tann dagin var: HB 1-Sumba 3.

IE



Í fjør vunnu sumbingar bert teir báðar dystirnar móti VB, og báðu ferðirnar var munurin eitt mál

Talvan sýnir sigrar hjá sumbingum í 1. deild, árini 1998-2000

Umfar	Móti	Úrslit	málskjúttar
1998			
2	ÍF (h)	1-0	Dánjal Johan Joensen 84
4	TB (h)	3-2	Eirikur Joensen 13, Dánjal Johan Joensen 44, Jan Poulsen 85 - Óli Johannesen 23, Eyðun Svalbard 27
1999			
9	VB (h)	1-0	René Thomsen 24
18	VB (ú)	2-1	Mortan úr Hørg 40, Spasojé Biberdzic 90 - Eyðun Jacobsen 63
2000			
5	FSV (h)	1-0	Sasa Tomajek 60

Páll Guðlaugsson er fremst í Íslandi

Ísland: *Og Allan Mørkøre skoraði enn einaferð, tá annað umfar í íslendsku landskappingini varð spælt mánakvøldið*

EYÐUN KLAKSTEIN

Keflavík, sum Páll Guðlaugsson venur, hevur heilt óvæntað lagt seg á odda í íslendsku landskappingini, nú tvey umfør eru spæld.

Mánakvøldið spældi Keflavík, sum ongan føroyskan spælara hevur á liðnum, ímóti meistarunum, KR, og hesin dysturin, sum var á heimavøllinum hjá KR, endaði við 3-2 sigri til Páll og hansara menn.

Hetta ger, at Keflavík hevur fult stigatal eftir fyrstu tveir dystirnar. Tað hevur Akranesi, har Uni Arge er sáttmálabundin, eisini, men Keflavík hevur betri málmun.

Einasta fótbóltshøllin í Íslandi liggur í Keflavík, og tað er helst viðvirkandi til, at liðið hjá Páll Guðlaugsson er so væl fyri tíðliga á árinum.

Páll hevur vant nógv við sínum monnum í høllini, meðan venjingin hjá øðrum feløgum hevur verið merkt av, at veðrið í Íslandi hevur verið vánaligt langt út á árið.

Allan skoraði aftur

Akranes kláraði akkurát at toga ein sigur í land, tá teir spældu á útivølli ímóti Breiðablik. Sambært íslendsku fjølmiðlunum var álopsspælið hjá Akranesi merkt av, at Uni Arge ikki var við. Tað gekk striltið at fáa hol á, og ikki fyrr enn í seinastu løtu fekk Akranes einasta málið í dystinum við brotssparki.

Uni Arge fær ikki spælt næstu seks vikurnar.

Allan Mørkøre skoraði annan landskappingardystin á rað, tá ÍBV vann dystin móti Stjørnuni 2-0.

Dysturin varð spældur á Vestmannaoyggjunum, og hóast Allan og teir fingu ein mann útvístan stutt eftir hálvleiksstreðgin, tá støðan framvegis var 0-0, so vóru tað teir, sum stýrdu dystinum.

Við 10 monnum trýsti ÍBV Stjørnuna, og tá 12 minuttir vóru eftir at spæla eydnaðist at fáa mál. Tað gjørdi Jóhann Møller. Tá fimm minuttir vóru eftir at spæla staðfesti Allan Mørkøre sigurin hjá ÍBV.

Leiftur javnleik

Allan Mørkøre hevur skotið mál í báðum teimum fyrstu landskappingardystunum, og tað er bara ein spælari í Íslandi, sum hevur skotið fleiri mál enn hann. Tað er Guðmundur Steinarsson hjá Keflavík, sum hevur skotið trý mál.

Leiftur, sum hevur fýra føroyskar spælarar á liðnum, var mánakvøldið á vitjan hjá Fylkir, sum spældi javnleik móti ÍBV í fyrsta dystinum.

Hesaferð eydnaðist tað aftur Fylkir at fáa ein javnleik, tí dysturin móti Jens Martini Knudsen og hansara monnum endaði 1-1. Málið hjá Leiftri gjørdi brasiliumaðurin Santos.

Felagið hjá Páll Guðlaugsson hevur fingið sera góða byrjan í íslendsku landskappingini, og mánakvøldið vunnu teir útidystin móti meistarunum úr KR